BURÐARDYGT
VINNULÍV

SAMAN
RØKKA VIT
LONGRI

BURÐARDYGT VINNULÍV 2021

Um **átakið**

Føroyskar fyritøkur ganga á odda við grøna orkuskiftinum

Burðardygt Vinnulív er ein felagsskapur við tólv føroyskum fyritøkum, sum hevur til endamáls at menna fyritøkum burðardyggar mannagongdir við serligum atliti at trimum ítøkiligum avbjóðingum: veðurlagsbroytingum, heilsustøðuni í havinum og tapi av lívfrøðiligum margfeldi.

Gjøgnum samstarv roynir felagsskapurin at gera sítt til at vera við í ST-málunum fyri burðardyggari menning (SDG 13 Veðurlagsátøk, SDG 14 Lív í havi og SDG 15 Lív á landi) – skjótari og við størri ávirkan, enn vit høvdu megnað hvør í sínum lagi.

Í januar 2021 settu fyritøkurnar sær fyri at arbeiða saman í minsta lagi trý ár til tess at menna eitt strategiskt háttalag, ið eyðmerkir vágarnar og møguleikarnar, sum standast av hesum avbjóðingum.

Nú í 2022 vísa vit á framstigini, sum samstarvið hevur ført við sær aftan á eitt ár.

Okkara mannagongd

Vit hava fimm høvuðsendamál, sum vit hava sett okkum fyri at røkka: **1)** at gerast klókari og dugnaligari at handfara avbjóðingarnar; **2)** at menna burðardyggar mannagongdir gjøgnum eina strategiska langtíðarætlan; **3)** at samstarva, so vit koma skjótari á mál; **4)** at fáa restina av samfelagnum at taka lut; og **5)** ikki minst at hugkveikja føroyingar yvirhøvur til eisini at raðfesta hesi stevnumið.

Okkara endamál er at ganga á odda við grøna orkuskiftinum gjøgnum burðardygga virðisskapan.

Veðurlagsbroytingar: Vísindaliga grundað átøk fyri at minka um CO_2-útlát

Lívfrøðiliga margfeldið og høvini: Net-positiv lyfti um at fara betur um náttúruna

Samskifti: Gjøgnumskygni, standa til svars og ávirka samfelagsbroytingar

Útgivið: 9. september 2022. Onnur útgáva.

www.burdardygtvinnuliv.fo

Í 2021 **kom hetta burturúr**

Limirnir í Burðardyggum Vinnulívi koma úr ymiskum fyritøkum, sum hava ymiskar bygnaðir og ymiskar marknaðir. Okkara virksemi røkkur út um landoddarnar: Vit virka í fleiri enn tíggju londum, og okkara veitingarketa spennir yvir fýra heimspartar.

Vit hava øll ein týdningarmiklan leiklut í vinnuliga kervinum í Føroyum, og mong okkara hava samstarvað á ymsan hátt í nógv ár.

12 stórar, miðalstórar og smærri fyritøkur, sum virka í Føroyum í 2021

Umboða meira enn 20% av privatu arbeiðsmegini í Føroyum

Nógvar verkætlanir millum limirnar eru í umrøðu ella byrjaðar í fyrsta árinum av samstarvinum

---

9% av føroyskum CO_2-ávirkanum frá vavi 1 og 2 CO_2e-útlátum í 2021 (11% í 2020)

11 fyritøkur minkaðu um vav 1-útlát í 2021

5 fyritøkur minkaðu um vav 2-útlát í 2021

Nógv nýggj tiltøk farin at røkka net-positivum lyftum

50+ lyfti um at varpa ljós á tap av lívfrøðiligum margfeldi og heilsustøðuna í havinum

Okkara framstig í at viðgera **veðurlagsbroytingarnar**

Okkara uppgáva

Oyggjalív er tengt at góðum tilknýti til náttúruna. Meðan náttúran kring Føroyar enn er rættiliga óspilt, so er støðan heilt øðrvísi úti í heimi. Nógv fáa sínar vørur og rávørur úr øðrum londum, og vit síggja tað sum okkara ábyrgd at vísa á, hvussu hetta ávirkar umhvørvið – bæði her heima og í alheims virðisketum. Meðan altjóða fyritøkur støðugt raðfesta týdningin av at verja og varðveita høvini og lívfrøðiliga margfeldið, gera vit tað sama. Eins og við veðurlagsbroytingunum hava vit sett okkum fyri at fylgja við urkendum leiðreglum fyri at skilja, hvussu vit kunnu hava eina net -positiva ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið. Vit hava fingið meira vitan á hesum øki, og tað halda vit áfram við í okkara arbeiði.

Okkara tilgongd

Í felag menna vit eina strategiska og skipaða tilgongd til tess at handfara veðurlagsbroytingarnar. Fyrst royna vit at skilja samanhangin, síðani eyðmerkja vit okkara ávirkan, og at enda raðfesta og leggja til rættis loysnir, ið hava stóra ávirkan.

Vit fara til verka stigvíst í okkara arbeiði. Í verkætlanarbólkinum, sum viðger veðurlagsbroytingar, hevur okkara fyrsta uppgáva verið at skilt okkara egnu einstøku ávirkan. Tey fyrstu árini kortløgdu vit okkara vav 1 (beinleiðis) og vav 2 (óbeinleiðis) CO_2 e útlát og settu okkum sum mál (í tráð við vísindalig til mæli) at minka vav 1 og 2 útlát niður í helvt áðrenn 2030. Vav 3 er, har fyritøkur hava størstu útlátini, og hesi eru verri at stýra. Í ár fara vit framhaldandi at fáa greiðu á hesi útlát, og eru vit nú byrjað at rapportera hesi fyri fyrstu ferð. Vit hava sett átøk í gongd fyri fýra øki innanfyri vav 3.

Næstu tíðina fara vit eisini at hyggja nærri at tillagingum og avmarkingum.

Vit gera eina árliga frágreiðing um framstigini, og vit miðja eftir at fáa efturkannað og váttan fyri, at tølini eru røtt, har tað letur seg gera.

Okkara ætlan

Í 2021 settu vit okkum mál fyri, at okkara átøk eru í tráð við vísindalig tilmæli, meðan vit minka um okkara ávirkan á veðurlagsbroytingarnar:

50% lækking av CO_2e áðrenn 2030
Allar fyritøkur fara at minka teirra vav 1 og 2 CO_2e útlát í minsta lagi niður í helvt áðrenn 2030

Net-zero áðrenn 2030
Tríggjar fyritøkur fara stigið víðari og ætla at røkka einum 0-vakstrarhúsgassútláti í vavi 1 og 2 áðrenn 2030

Í 2022 fara vit eitt fet víðari:

Minka um vav 3 CO_2-útlát í okkara virðisketum
Lata okkara mál inn til Science Based Targets Initiative við árslokárslok

Okkara framstig í 2021

Vit fegnast um at kunna boða frá, at vit eru komin ávegis í at røkka tey mál, sum vit settu okkum í 2021. Nógvar fyritøkur hava minkað um útlátið í vavi 1 – eini minking í brennievnisnýtsluni. Onkrar fyritøkur høvdu tó størri útlát, tí fyritøkurnar vuksu. Vit settu okkara mál tá árið var komið í helvt, og tískil hava vit bert haft eitt tíðarskeið upp á seks mánaðir at minka um útlátið. Hesum eru vit sera stolt av. Sum væntað upplivdu tó nakrar fyritøkur eina øking í vavi 2 vegna øktu elnýtsluna, nú farið varð til elektriskar hitapumpur og løðistøðir til elbilar. Vit vóna, at hesi útlát minka, tá ið SEV fer burtur frá at nýta kolevni og fer bert at framleiða streym við 100% varandi orku í 2030.

Okkara avbjóðingar

Mong okkara hava stórar vakstrarætlanir, so um vit vilja minka útlátið, men samstundis vaksa sum fyritøka, verður hetta ein stór avbjóðing – serliga í økjum, har vit ikki hava so nógva ávirkan á okkara virðisketu. Men við tað, at mong okkara longu samstarva, so hava vit eyðmerkt nakrar hættir, sum gera, at hetta ber til.

Fyri at røkka okkara mál um at minka vav 1 og 2 útlát, fara vit at líta á SEV um at halda sítt lyfti um at framleiða 100% varandi orku í 2030. At fáa ráð til reina orku, samstundis sum vit framleiða el og kanna aðrar orkukeldur, verður eisini ein avbjóðing. Hetta er ein avbjóðing, sum onnur oyggjalond umframt tey, sum ikki kunnu njóta ágóðan av liberaliseraðum orkumarknaðum, kenna seg aftur í. Meðan hækkingar í brennievnisprísum eggja okkum til at skunda undir elorkuskiftið, so eru elprísir og atgongd til varandi orku enn ein týðandi forðing.

Mong okkara hava eisini tørv á, at bæði viðskiftafólk og veitarar stuðla okkum og taka lut í hesi ferð, um hetta skal eydnast okkum. Hvussu er og ikki, so vóna vit at vinna á øllum avbjóðingum í samstarvi við okkara áhugapartar.

13 CLIMATE ACTION

Okkara arbeiði stuðlar SDG 13 Veðurlagsátøk. Vit fara at seta átøk í verk ímótiveðurlagsbroytingum – fyrst umvegis avmarking, síðani tillaging og harnæst í samstarvi við lokalum avgerðartakarum.

Framstig viðvíkjandi varðveiting av **lívfrøðiligum margfeldi og høvum**

Okkara uppgáva

Oyggjalív er tengt at góðum tilknýti til náttúruna. Meðan náttúran kring Føroyar enn er rættiliga óspilt, so er støðan heilt øðrvísi úti í heimi. Nógv fáa sínar vørur og rávørur úr øðrum londum, og vit síggja tað sum okkara ábyrgd at vísa á, hvussu hetta ávirkar umhvørvið – bæði her heima og í globalum virðisketum.

Meðan altjóða fyritøkur støðugt raðfesta týdningin av at verja og varðveita høvini og lívfrøðiliga margfeldið, gera vit tað sama.

Eins og við veðurlagsbroytingunum hava vit sett okkum fyri at fylgja viðurkendum leiðreglum til at skilja, hvussu vit kunnu hava eina net-positiva ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið. Vit hava fingið meira vitan á hesum øki, og tað halda vit áfram við í okkara arbeiði.

Okkara tilgongd

Her fara vit eisini skipað til verka. Vit hava verið á skeið fyri at læra meira um alheimshóttanir á lívfrøðiliga margfeldið og fingið til vega eina yvirskipaða greining av okkara ávirkan. Hetta hevur víðkað okkara vitan, sum ger okkum før fyri at leggja til rættis eina langtíðarætlan fyri at røkka málunum vit settu okkum í fjør.

Vit umboða ymiskar fyritøkur, og summi okkara hava størri tørv á nátt úru tilfeingi enn onnur. Tó vita vit, at vit eru øll partur av somu skipan, eisini um okkara uppgáva er at fíggja ella bjóða loysnir til fyri tøkur, sum hava heilt stóra ávirkan. Tí arbeiða vit saman og gagnnýta styrk irnar hjá hvørjum øðrum fyri at fáa hendan tydningarmikla boð skapin út.

Í verkætlanarbólkinum, sum viðger lívfrøðiligt margfeldi og verju av hav um hvørvinum, settu vit okkum í 2021 fyri, at røkka í minsta lagi einum máli at gerast net-positiv áðrenn 2030 við hjálp frá serfrøðingum. Vit hava ment ætlanir, sum styðja undir at røkka hesum málum, umframt at hugsavnað okkum um, hvussu vit kunnu víðka hetta til onnur øki.

Okkara framstig í 2021

Í hesi frásøgn fara vit at koma nærri inná, hvussu vit ætla at røkka hesum málum og varpa ljós á ávirkanina, ið vit hava á náttúruna. Vitja heimasíðuna hjá fyritøkunum fyri nærri kunning. Vit fara at halda áfram at menna okkara tilgongd tey komandi árini.

Okkara avbjóðingar

Vit mugu skilja kreppuna, sum tað lívfrøðiliga margfeldið er í. Vit hava arbeitt við at menna eina skipaða og burðardygga ætlan, og nú eitt ár seinni duga vit at síggja, at vit hava enn langt á mál, bæði hvat viðvíkur okkara vitan, men eisini tá tað snýr seg um at finna haldgóðar loysnir.

Vit eru avmarkað av okkara tilfeingi og undirstøðuker vi í Føroyum, og tískil eru vit eisini avmarkað í teimum avgerðum, vit taka – alt frá útvegan av rávøru til handfaring av burturkasti.

Vit samstarva væl við áhugapartar, so vit vóna at vinna á hesum avbjóðingum umframt at geva øðrum fyritøkum íblástur til at raðfesta hesi stevnumið.

Okkara ætlan

100% av fyritøkunum átaka sær at gerast net-positiv í minsta lagi í einum øki av teirra ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið áðrenn 2030 ella at stuðla øðrum fyritøkum í hesum.

Í 2022 kunnger hvør fyritøka fleiri ætlanir sum fyrsta lið í at røkka hesum lyftum.

Okkara arbeiði stuðlar SDG 14 Lív í havi og SDG 15 Lív á landi. Vit fara at royna nýggjar leiðir fyri at minka munandi um havdálking, vísa á burðardyggar mátar at gagnnýta vistskipanir á sjógvi og landi og minka um tap av lívfrøðiligum margfeldi og venda gongdini hesum viðvíkjandi.

Yvirvøka av heilsustøðuni í havinum

Sum liður í at vit hava bundið okkum til at taka atlit til heilsustøðuna í havinum, hava vit fingið øll aliøki í Føroyum ASC-góðkend.

Fyri at minka um okkara ávirkan á firðirnar hava vit sett tiltøk í verk so sum at flyta aliringar til øki við harðari streymi og at steðga við at nýta koparviðgjørdar nótir. Umframt tað hava vit sett undirsjóvarkamera í aliringarnar fyri at fáa sum mest burtur úr fóðringini, og hetta hevur bøtt um bæði fiskaheilsuna og umhvørvið.

Kanningar vísa, at okkara átøk hava loyst seg. Eitt nú vísa royndir áhaldandi ábøtur á havbotnin. Seinastu árini eru heili 80-90% av okkara firðum mettir at verða undir lítlari og ongari ávirkan samsvarandi galdandi standardi í Føroyum fyri havbotnsmátingar.

Fyriuttan umhvørviskanningar meta vit javnan um støðuna á havbotninum umframt at eygleiða lívfrøðiliga margfeldið undir og nærindis aliringunum. Vit skráseta, hvussu nógv eru til av hvørjum djóraslagi, og greina síðani millum tað, sum bendir á ein sunnan havbotn.

Við okkara nýggja grundleggjandi kunnleika um lívfrøðiliga margfeldið á botninum í sjónum kenna vit okkum sannførd um, at okkara virksemi ikki hevur neiliga ávirkan á heilsustøðuna í firðunum.

BAKKAFROST Laksaaling, pakkitilfar, biogass, fiskamjøl, lýsi og fóður

Í 2021 minkaðu avbjóðingarnar, ið stóðust av alheimsfarsóttini, og vit byrjaðu at venda aftur til ein vanligan gerandisdag. Samstundis var tað fjórða árið av okkara burðardygdarætlan, og vit eru ógvuliga nøgd við okkara framstig innan burðardygd.

Eitt nú kunnu vit nevna byggingina av nýggjum biogassverki, ið framleiðir orku burtur úr lívfrøðiligum burturkasti og veitir orku til 1500 húsarhald; vit hava stovnað Sunt Lív-grunnin, ið hevur fíggjað samstarvið Fróðskaparsetri Føroya, umframt at fígging er latin til bygging av nýggjum elriknum alibáti.

Í 2021 gjørdu vit nakrar royndir í at menna fóðuruppskriftir til tess at betra um evnið hjá laksinum at upptaka føðsluevni og mineralir, ið bæði fer at bøta um heilsustøðuna hjá fiskinum og havbotninum. Vit hava eisini ment okkara ávaringarskipan viðvíkjandi fiskaheilsu.

Vit hava hildið á við okkara burðardyggu vakstrarætlan, har vit loysa útlátið av vakstrarhúsgassum frá vøkstrinum í okkara virðisketu. Í 2021 kunngjørdu vit eitt nýtt vav 3-mál fyri CO_2 pr. framleitt tons av laksi

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Í 2021 minkaði CO_2-útlátið fyri hvørt tons av framleiddum laksi við 38%. Orsøkin er í høvuðsheitum minni virksemi á Havsbrún hetta árið samanborið við undanfarin ár umframt eina lækking av brennievnisnýtsluni í okkara alivirksemi

Í 2022 halda vit fram við at leggja landstreym til okkara fóðurflakar. Vit fáa ein brunnbát, ið er hybrid, umframt at vit fáa eina elrikna tvíkilju.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 52% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	254,042,693	186,349,128	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	72,945,324	76,642,269	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	66,998	49,086	-27%
CO_2e vav 2 útlát	29,304	30,225	5%
CO_2e vav 3 útlát (sí mark á síða 33)	267,213	288.255	8%

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

MÁL: Vit miðja ímóti, at okkara alivirksemi hevur positiva ávirkan á havumhvørvið og okkara virksemi á landi í Føroyum (t.d. skrivstovur og smoltstøðir) hevur positiva ávirkan á landøki í 2030.

Ávirkan á náttúruskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Nýtsla av landøki	Vit fara at gera íløgur í at endurskapa land.	m²	2021	Vit hava landstøðir, smoltstøðir og skrivstovur kring Føroyar.
Havnýtsla og vistskipanir	Vit fara at almannakunngera fleiri mál fyri at gerast 'net-positive' í 2023.	-	-	Vit arbeiða í løtuni við at menna eina strategi fyri at gerast 'net-positive'.
	Eingin fiskur skal sleppa.	Tal av fiski, ið er sloppin	(Áhaldandi mál)	Hetta fer at fyribyrgja óynskta ávirkan á djóralív og laks.
	Vit fara at optimera fóðringina á sjónum við at fáa betri fóðurloysnir.	Fóðurfaktor	(Áhaldandi mál)	Hetta fer at minka um umhvørvisárinið á havbotnin frá fóðring.
	Áseta eitt støði fyri lívfrøðiligt margfeldi á havbotninum, ið vit fara at nýta til farmtíðar umhvørvismetingar.	-	-	Íløgur í at áseta eitt støði eru avgerandi fyri at betra um vitanina av lívfrøðiligum margfeldi á botnunum í føroyskum firðum. Arbeiði kann eisini stuðla undir vitan, so vit kunnu minka um møguliga ávirkan, við at arbeiða strategiskt í staðsetingini av okkara virksemi (t.d. at staðseta aliringar í økjum við optimalum havstreymi).
	Vit fara at samstarva við ymiskar áhugapartar til tess at minka enn meira um okkara ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið í havinum.	-	-	-

betri banki

Menning av starvsfólki

At hugsa burðardygt er av stórum týdningi fyri at fáa burðardygd inn í okkara gerandisdag, og er hetta tað fyrsta stigið í okkara ferð at gerast burðardygg. At fáa starvsfólk okkara við í grøna orkuskiftið hevur verið raðfest høgt.

Í byrjanini av árinum høvdu vit eitt tiltak fyri øll starvsfólk í landinum, har vit kunnaðu um Burðardygt Vinnulív og tey framstig, sum vit hava gjørt, síðani vit komu við.

Tiltakið fevndi m.a. um framløgu frá einum plantufrøðingi frá Tjóðsavni Føroya um støðuna í føroysku náttúruni.

Hetta hjálpti okkum at fáa eina breidri fatan av okkara ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið her á landi. Vit hava eisini haft undirvísing fyri leiðsluni, har vit fingu serfrøðingar at deila teirra vitan við okkum. Umframt at fáa øll starvsfólk við, útbúgva vit eisini ávís starvsfólk fyri at kunna veita kundum okkara burðardygga fígging. Vit fara áhaldandi at menna okkara starvsfólk.

BETRI Banki

Síðani vit komu við í Burðardygt Vinnulív, er okkara ferð við at gerast ein burðardyggur banki av álvara byrjað. Vit hava sett okkum langtíðarmál at minka um okkara beinleiðis ávirkan á umhvørvið og lívfrøðiliga margfeldið og hava ment eina ætlan um, hvussu vit røkka hesum málum áðrenn 2030.

Burðardygd er blivin eitt strategiskt fokusøki og er fært inn í virkiskarmar bankans. Burðardygd er nú ein partur av okkara gerandisdegi við tí fyri eyga, at burðardygg fígging við tíðini gerst ein natúrligur partur av okkara virksemi.

Vit hava sett starvsfólk, so vit verða før fyri at fremja langtíðarætlanir um burðardygd frameftir. Harumframt læra vit okkara starvsfólk um, hvat burðardygd merkir fyri okkum, so tey eru betur ílatin at veita kundum okkara tænastur á hesum økinum.

Í 2021 hildu vit áfram at menna okkara fíggjarproduktir við lagaligari rentum og treytum til tess at skunda undir grøna orkuskiftið. Hóast vit vita, at tað eru kundarnir, sum í roynd og veru hava størstu ávirkanina, so meta vit tað vera eins umráðandi, at vit sjálvi gerast burðardygg eisini.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Longu aftan á seks mánaðir megnaðu vit at minka um útlátini frá okkara virksemi.

Tað gjørdu vit við at fara frá oljufýri til jarðhita í okkara bygningi í Miðvági – bara hetta minkaði hitarokningina munandi. Vit skiftu eisini ljósini út í teimum flestu bygningunum við LED umframt at skifta tríggjar bensinbilar út við tveir el-bilar.

Í 2022/23 fara vit at skifta til jarðhita í einum av okkara høvuðsbygningum í Havn umframt at umvæla ein bygning fyri at gerast meira orkusparandi.

MÁL VAV 1 & 2: Betri Banki fer at minka um vav 1 og 2 CO_2e-útlát við 55% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	1,183,620	1,155,941	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	468,657	473,742	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	302	295	-2%
CO_2e vav 2 útlát	189	189	-0.7%
CO_2e vav 3 útlát*	-	154	

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Í 2021 og í byrjanini av 2022 hava vit áhaldandi arbeitt við at menna okkara langtíðarætlan til tess at røkka okkara málum. Vit eru byrjað at økja vitanina fyri at betra um okkara fatan av okkara ávirkanum. Sum banki eru vit greið yvir, at okkara størsta ávirkan kemur frá fígging til vinnu- og privatkundar. Sjálvt um okkara beinleiðis ávirkan er lítil í samanberingini, so meta vit, at vit sjálvi skulu minka okkara beinleiðis ávirkan, og tískil arbeiða vit við at kanna okkara virðisketu og minka um okkara burturkast.

MÁL: Betri Banki miðar ímóti at gerast net-positivur í 2030, tá tað snýr seg um umhvørvisávirkan á sjógvi og á landi. Bæði hvat viðvíkur virksemi í Føroyum, okkara árin, hvar vit útvega rávørur, men eisini burturkastið, vit framleiða.

Ávirkan á nátturuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Landøki	Innan 2030 vilja vit stuðla endurskapan av landøkjum í Føroyum, sum í minsta lagi svarar til landøkið okkara bygningar standa á. Vit vilja stuðla og veita fígging til virksemi og verkætlanir, sum bøta um lívfrøðiliga margfeldi.	m^2 av landøki til okkara bygningar	2021	-
Land/vatn /sjógvur	Innan 2023 fara vit at kanna nærri okkara keyp av vørum, fyri at kunna staðfesta, hvørjar vørur kunnu hava eina stóra ávirkan á lívfrøðiligt margfeldi.	-	2021	Ávísar vørur vit keypa kunnu hava eina neiliga ávirkan á umhvørvi.
Dálking	Vit vilja minka um okkara matburturkast við í minsta lagi 50% innan 2025.	Kg. av burturkasti	2021	Burturkast frá okkara virksemi hevur beinleiðis ávirkan á umhvørvi.

Í 2022 og 2023 fara vit at kanna nærri, hvørja óbeinleiðis ávirkan tað hevur, tá ið vit veita fígging til vinnu- og privatkundar. Hetta er ein stór uppgáva, men vit vita, at tað er her, vit kunnu gera størstan mun.

At arbeiða við vindi

Í byrjanini av 2021 vunnu vit útboðið at byggja 25,2 MW vindmyllulund á Gellingarkletti oman fyri Havn. Vindmyllulundin fer árliga at framleiða 100 GWh, sum er 25% av samlaðu el-framleiðsluni í Føroyum, og svarar tað til el-tørvin hjá øllum privatum heimum í landinum. Henda verkætlan er eitt stórt stig á røttu leiðini, við tað at vit minka um oljunýtsluna her á landi við okkurt um 35% (eini 19.000 tons um árið). Áðrenn ætlanin fór í gongd, gjørdu vit umhvørviskanningar av fuglalívi og djórum og plantum í økinum, við tí fyri eyga at minka um okkara ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið. Stig eru tikin út frá úrslitum frá hesum kanningum til tess at tryggja, at jørðin, sum er nýtt til verkætlanina, kann vaksa fram av nýggjum. Vit fara framhaldandi at arbeiða fyri at røkka okkara máli um at gerast net-positiv í ávirkan, sum vindmyllulundin kann fáa á nærumhvørvið og umhvørvið í síni heild, áðrenn 2030.

EFFO Orkuveitari

Í 2021 komu vit longri á leiðini at gerast burðardyggari. Fyri fyrstu ferð settu vit okkum fyri at minka um okkara vakstrarhúsútlát og at minka um okkara ávirkan á umhvørvið. Harumframt hava vit sum Føroya størsti veitari av orku bundið okkum til at hjálpa og ráðgeva okkara kundum, hvussu tey kunnu røkka egnum málum við at varnast og innføra hættir at gerast burðardygg. Eitt hæddarpunkt fyri okkum í 2021 var verkætlanin at byggja vindmyllulund á Gellingarkletti. Eisini hava vit sett upp snarløðistøðir til elbilar á tveimum av okkara støðum.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Vit eru nú farin frá strategiskari planlegging til ítøkiligar verkætlanir fyri at minka um okkara CO_2e-útlát umframt at stuðla okkara kundum í at minka um síni egnu útlát.

Vit hava innført ein orkusparandi koyripolitikk til okkara tangabilførarar og harumframt eina munadyggari koyriætlan. Vit eru partur av nýggjari el-løðistøð í Skálabotni og í Kollafirði. Á høvuðsskrivstovu okkara hava vit nú gjørt klárt til eina hitaendurvinningarskipan og arbeiða við hitastýringum. Tað hevur gingið væl at byggja vindmyllur við Gellingarklett. Vindmyllurnar eru lutvíst settar í rakstur, hóast nakað vantar, til full gongd er komin á.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 20% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	3,289,936	3,206,045	40%
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	1,109,511	1,197,181	8%
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	816	793	-3%
CO_2e vav 2 útlát	448	474	6%
CO_2e vav 3 útlát*	-	312	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

Í 2022 innføra vit eina skipan, sum endurnýtir hitan á okkara høvuðsbygningi umframt at bøta um okkara burturkastskipan fyri at minka um okkara vav 3-útlát.

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Fyri at røkka okkara málum eru vit farin at víðka um okkara fatan av tí ávirkan, sum okkara vindmyllur møguliga hava á náttúru og djóralív. Tað er nógvur fuglur í Føroyum, og er ætlan okkara at virka fyri at verja og menna fuglalív í breiðari merking. Sum liður í okkara stremban gjøgnumganga vit eitt nú pakkitilfarið til vørur, vit selja á Effo-støðunum, fyri soleiðis at minka um spill og ávirkan á umhvørvið annars. Fyri at minka um nýtslu av einnýtisplasti hava vit framleitt termokoppar.

MÁL: Vit stremba eftir, at okkara virksemi hevur positiva ávirkan á okkara umhvørvi í 2030. Bæði hvat viðvíkur sjógvi og landi.

Ávirkan á náttúruskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Nýtslan av landaøki	Vit vilja ISO 14001 góðkenna okkara vindmyllulundir í 2023.	% av deildum	2022	At fylgja viðurkendum ásetingum er fyrsta stig at minka um okkara ávirkan á umhvørvi.
	Vit skulu tilevna eina ábyrgdarfulla innkeypsætlan og politik í 2024.	-	-	At tryggja ábyrgdarfult innkeyp av tilfari til vindmyllulundir, kann minka um okkara framtíðar ávirkan á náttúruna.
	Vit skulu fylgja ávirkanini sum vindmyllurnar hava á náttúruna og fremja kanningar og royndir av hesum. Úrslitið skal nýtast til víðari tilrættalegging í 2024.	-	-	Betri vitan um ávirkan frá vindmyllum á náttúruna, kann minka og útiloka negativar ávirkanir í framtíðini.
	Áðrenn 2023 skulu vindmylluveingir, ið verða niðurtiknir, latast til endurnýtslu.	% av bløðum	2020	Endurnýtsla minkar um ráðvørutrýsti á náttúruna.
	Vit skulu stuðla verkætlanum sum betra um lívfrøðiliga margfeldi í Føroyum.	Munagóðar ætlanir	-	Økja samlaða lívfrøðiliga margfeldi í Føroyum.

Vit hava sum mál at áhaldandi betra um okkara ávirkan á náttúru og lívfrøðiliga mergfeldið á øllum økjum.

Grøn lyfta

Í fjør lovaðu vit at minka okkara vav 1 og 2 CO_2-útlát við minst 50% áðrenn 2030. Eitt tað fyrsta, vit gjørdu, var at elektrifisera virksemið á landi – virksemi, sum kravdi nógva olju. Í 2021 settu vit okkum fyri at okkara nýggi Gottwald-krani skuldu gerast el-rikin. Kranin megnar at lyfta tað sama sum verandi kranar, sum ger tað lættari at eyðmerkja munin á útlátssparingum samanborið við okkara diesel-rikna krana, sum hevur eitt árligt útlát á 113 tCO_2.

FAROE SHIP Vøruflutningur og logistikkur

Í 2021 hugsavnaðu vit okkum um at avkola okkara virksemi uppi á landi. Vit minkaðu okkara CO_2-útlat við 871 tCO_2. Tað er í høvuðsheitum okkara luttøku í Burðardyggum Vinnulívi at takka, at vit eru vorðin meira varug við okkara ávirkan á umhvørvið – og meira avgjørd um at gera nakað við tað.

Fyri at røkka teimum málum, vit settu okkum í 2021, hildu vit, at tað var av týdningi at innhugsa burðardygd, tá ið vit taka avgerðir um innkeypsmannagongdir.

Vit síggja longu úrslit. Fyri at minka um okkara CO_2-árin keyptu vit í 2021 el-trukkar og løgdu íløgur í ein el-krana. Hesir verða partur av okkara virksemi á heysti 2022. Vit viðka í løtuni um okkara egnu ávirkan við eini útbygging av vørugoymsluni og einum nýggjum skrivstovubygningi. Ætlanin er at nýta eina burðardygga hitaloysn við at hita bygningin við sjóhita.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Í 2021 sóu vit eina minking á 22% í okkara vav 1-útláti, sum í stóran mun stóðst av sølu av ognum, styttri koyrilongdum vegna nýggja undirsjóvartunnilin umframt nýggjum el-bilum.

Í 2022 vænta vit uppaftur minni útlát, nú okkara gaffiltrukkar og krani eru vorðnir el-riknir. Vit fara eisini at minka um okkara vav 3-útlát – vit byrja við at skráseta hesi, so vit hava eitt amboð til okkara virksemi framyvir.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka CO_2 útlátið innan vav 1 og 2 í minsta lagi niður í 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 25% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	13,479,400	10,625,137	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	2,258,251	1,919,699	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	3,262	2,535	-22%
CO_2e vav 2 útlát	912	760	-17%
CO_2e vav 3 útlát*	-	1,364	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Í 2021 og í byrjanini av 2022 hugsavnaðu vit okkum um, hvussu vit fara undir at viðgera okkara ávirkan á náttúruna. Vit hava víðkað um á havnalagnum, og vit kanna nøktandi loysnir, sum kunnu fremja eitt munagott íkast til lívfrøðiliga margfeldið í nærumhvørvinum, so vit kunnu røkka okkara høvuðsmál um at gerast net-positiv í okkara ávirkan áðrenn 2030.

GOAL: Faroe Ship leggur seg eftir eini tilgongd, sum ger felagið net-positivt, tá tað snýr seg um ávirkan okkara á landi, á umhvørvið frá støðum og terminalum og ávirkanina av maskinum og útgerð, sum vit keypa til virksemi okkara á landi.

Ávirkan á náttuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Broyting í lendisnýtslu	Í 2025 hava vit gjørt íløgur í loysnir, sum vaksa um lívfrøðiliga margfeldni í lendi, so hetta verður størri enn lendi, sum vit nýta til bygningar og terminaløki.	m² av lendi ment, endurskapt ella vart	2022 (3000m²)	Tað er í løtuni ein munandi broyting í lendisnýtslu í Føroyum orsakað av vinnuligum útbyggingum.
Tilfeingis nýtsla	Í 2024 skulu vit tryggja, at í minsta lagi 75% av okkara veitarumar av gummi, træi og jarni eru skjalváttað burðardyggir.	% skjalváttað	2022	Broyting av lendi og avskóging av økjum er ein álvarslig avbjóðing fyri umhvørvið.
	Í 2023 skulu vit avmarkað okkara nýtslu av einnýtis plattum við 50%.	% minkað	2022	

2022 snýr seg fyri okkum um at fáa betri fatan av okkara ávirkan á umhvørvið, ið kemur frá okkara virksemi her í Føroyum; serliga tá ið vit halda áfram við okkara virksemi á landi. Vit fara eisini at halda áfram við at innføra burðardygd í okkara keypsavgerðir fyri at tryggja, at vit í síðsta enda kunnu vísa á eina net-positiva ávirkan frá maskinum og útgerð, ið skulu brúkast til okkara virksemi á landi.

At gagnnýta náttúrukreftirnar

Vit hava hugsavnað okkum um at samstarva við feløg, sum hava somu burðardyggu ætlan eins og vit. Í 2021 gagnnýttu vit møguleikan at leggja nýggja hitaskipan inn í bygningin í Klaksvík, har ið kommunan hevur gjørt íløgur í grønt undirstøðukervi mitt í býnum.

Bygningurin í Klaksvík verður nú rikin við sjóorku og eli, og vit meta, at hetta fer at minka um oljunýtsluna við umleið 7.000 litrum um árið. Hetta svarar til eina árliga minking av CO_2-útláti upp á 19 tons.

Tað eru góð tíðindi, at nýggja hitaskipanin gongur í takt við kósina hjá SEV, sum hevur til endamáls, at øll elorka á landi skal stava frá varandi orkukeldum í 2030. Vit væenta sostatt, at útlátið frá sjóorkuskipanini fer at minka á hvørjum ári.

FØROYA TELE Fjarskifti

Í 2021 spentu vit bogan og miðaðu eftir at verða 100% CO_2-frí í 2030. Longu sama ár, sum operatión null CO_2-útlát fór av bakkastokki, hómaðust stór framstig í vavi 1 og vavi 2. Við elbilum og hitaloysnum, sum eru riknar við jarð- og sjóorku, fegnast vit um, at vit megnaðu at minka um árliga CO_2-útlátið við 172 tonsum sammett við 2020.

Í 2021 settu vit eisini lyftið um burðardygd á dagsskránna við at fremja fult gjøgnumskygni í okkara ESG-tølum. Hesi tøl vórðu almannakunngjørd í árligu CSR-frágreiðingini, og vit fara framhaldandi at greiða frá ESG-útinningum á hvørjum ári.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Í 2021 gjørdu vit stór framstig í okkara operatión null CO_2-útlát í 2030. Vit burturbeindu 172 tons av CO_2-útláti sammett við árið fyri, og tað var orsakað av trimum inntrivum: Í Søldarfirði fóru vit frá oljufýrdum sentralhita til jarðhita, í Klaksvík fóru vit frá oljufýrdum sentralhita til sjóhita, umframt at vit skiftu fleiri bilar út við elbilar.

Í 2022 er ætlanin at gera tvær stórar, burðardyggar íløgur umframt at skifta enn fleiri bilar út við elbilar. Á Tvøroyri fara vit at leggja um til jarðhita, og í Miðvági byggja vit nýtt tøknihús, sum verður rikið av sólorku.

MÁL VAV 1 & 2: Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 CO_2 spor innan árslok 2030.
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	1,364,543	1,734,481	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	6,364,221	6,304,809	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	413	295	-29%
CO_2e vav 2 útlát	2,570	2,497	-3%
CO_2e vav 3 útlát*	-	626	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Vit eru í holt við at víðka um og betra um okkara infrakervi. Í 2021 og 2022 hava vit greinað okkara ávirkan á umhvørvið, sum letur upp fyri, at okkara langtíðarmál kunnu gerast net-positiv í okkara ávirkan frá hesum virksemi.

MÁL: Áðrenn 2030 ætla vit at gerast netpositiv í mun til ta ávirkan, vit hava á hav og land, tá ið vit leggja og útvega okkum kaðlar.

Ávirkan á nátturuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Land/sjógvur	Áðrenn 2023: 100% av farnetundirstøðukervinum, sum er tikið úr rakstri, er endurvunnið ella endurnýtt.	%	2022	Ein týðandi møgulig ávirkan, sum vit hava beinleiðis á náttúruna, kemur frá broytingunum á landi og sjógvi fyri at leggja fjarskiftisundirstøðukervið niður.
	2025: Koma til niðurstøðu í kanningararbeiði í mun til at greina ávirkanina av lívfrøðiligum margfeldi av installeraðum kaðlum fyri at røkka okkara máli.	-	-	
	Við árslok 2030: 100% av undirstøðukervinum, sum verður bygt út, fylgir nýggju mannagongdini og vissar so lítla umhvørvisávirkan sum til ber.	%	-	
	Áðrenn 2025: Gera íløgur í verkætlan, sum skal endurnýggja ella hækka lívfrøðiligt margfeldi, fyri at kompensera møguligar ávirkanir.	-	-	
Tilfeingisnýtsla	Áðrenn 2024: Gera yvirlit yvir møguliga ávirkan, tá ið farið verður undir at fáa til vegar nýtt undirstøðukervi.			Eins og tað eru ávirkanir á landi og sjógvi, eru tað eisini ávirkanir á náttúruna at fáa til vegar tilfar.
Vit arbeið eisini við óbeinleiðis ávirkan á náttúruna, av seldum vørum í handlum okkara, við denti á ringráshugsan.				

Næstu árini fara vit at burturbeina niðurløgd infrakervi, har vit meta, at tað kann bøta um lívfrøðiliga margfeldið og heilsustøðuna í havinum. Fyriuttan at seta okkum mál, sum viðvíkja beinleiðis ávirkan frá okkara infrakervi, vilja vit eisini stuðla kundum okkara við at burturbeina okkara vørur á forsvarligan hátt. Okkara endamál er at minka um vandan fyri neiligari ávirkan á umhvørvið frá plasti og vandamiklum burturkasti. Fyri at megna tað ætla vit at innføra burðardyggar loysnir í mun til endurnýtslu og endurnýtslu av tóleindum.

Einki burturkast

Í Gist & Vist royna vit at flætta burðardygd inn í alt tað, sum vit fáast við á hotellunum og matstovunum. Á vári í 2021 gjørdu vit framstig, tá ið vit fingu nýggjan køk við Teiti Christensen á odda, hvørs høvuðsuppgáva er at gera allar okkara matstovur burðardyggari.

Hann hevur ábyrgd fyri at finna nýggjar, burðardyggar loysnir, tá ið tað snýr seg um innkeyp av rávørum, matgerð, pakking umframt at samanseta eina vitan, sum fer at gagna øllum okkara matstovum. Vit vilja, at burðardygd skal innhugsast í alla tilgongdina – alt frá hvussu og hvar vit fáa matin til vega, til hvussu hann verður goymdur, riggaður til og pakkaður. At minka um matoyðsl verður sett í miðdepilin, og vit kanna burðardyggar og sirkulerar loysnir upp á alt burturkast. Vit hava eisini eitt mál um at økja um mongdina av lokalum rávørum til okkara matstovur. Í hesum samanhangi fær Teitur eitt tættari tilknýti til lokalar veitarar, so vit kunnu stuðla uppundir eini lokalari matvøruframleiðslu og minka um tørvin á óneyðugari pakking.

GIST & VIST Gestavinna og ferðavinna

At gerast burðardygg var lyklahugtakið fyri okkum í 2021. Vit byrjaðu við at flætta burðardygd inn alt okkara virksemi – alt frá leiðslu til gerandisrakstur á hotellum og matstovum. Okkara mál er at betra um og minka um ta neiligu ávirkan, vit hava á umhvørvið.

Tað, sum vit hava raðfest fremst, er at leggja um til grøna orku. Vit hava fyri stuttum økt um á Hotel Føroyum við 71 kømrum og nýggjum vælveruøki; ein víðkan, sum vit noyddust at taka hædd fyri, tá ið vit í fjør settu okkum sum mál at røkka einum nullútláti áðrenn 2030.

Tá ið vit byrjaðu hesa stóru byggiverkætlan, vistu vit, at vit máttu finna eina burðardygga hitaloysn – og tað gjørdu vit – víðkanin er einans tengd at jarðhita. Vit hava nú gjørt reina orku til eina treyt í øllum nýggjum byggiverkætlanum.

VEÐURLAGSBROYTINGAR
Nýggja varandi orkuloysnin á Hotel Føroyum er dømi um, hvussu vit hava megnað at sundurskilt vøksturin í fyritøkuni frá okkara CO_2-útláti í okkara virksemi.

Í 2022 lata tvær Etika-matstovur upp: ein í Havn og ein í Runavík. Hesar matstovur verða hitaðar upp við grønum orkukeldum. Tá ið nýggja spahúsið á Hotel Føroyum verður liðugt, verða tað hitað upp við jarðhita. Hetta er enn ein liður í at røkka einum nullútláti áðrenn 2030.

MÁL VAV 1 & 2: Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 CO_2 spor innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	2,372,843	2,224,647	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	1,783,276	1,983,146	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	605	567	-6%
CO_2e vav 2 útlát	720	785	9%
CO_2e vav 3 útlát*	-	304	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM
Í 2021 og í byrjanini av 2022 hugsavnaðu vit okkum um at menna eina haldgóða ætlan fyri at røkka okkara málum um eina net-positiva ávirkan á náttúruna framyvir. At minka um matoyðsl hevur verið raðfest fremst.

MÁL: Vit ætla at gerast net-positiv í okkara ávirkan á hav, land og vøtn áðrenn 2030, og ETIKA verður fyrsta eindin at røkka hesum máli.

Ávirkan á náttúruskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsok
Landøki	Verja m² av landøkið, ið svarar til etika matstovur innan 2030.	M² av vardum økið vs m² av etika matstovum	2021	Sum fyritøka kunnu vit ikki virka uttan at hava rakstarstøð. Fyri at minka um ávirkanina av hesum ynskja vit at verja landøkið eins stórt og tað vit búka til okkara etika rakstrarstøð.
Sjógvur	90% av sjógæti er burðardygt áðrenn 2030.	Keyp í DKK av burðardyggum sjógæti vs. Samla keyp í DKK av sjógæti	TBC	Á etika borðreiða vit í stórum parti við sjógæti. Av tí sama er alneyðugt at hesar vørur eru burðardyggar.
Dálking	90% av øllum pakningi er endurnýttir, endurnýtiligur ella bio-niðurbrótiligur innan 2030.	Keyp í DKK á pakning vs. Keyp í DKK á burðardyggan pakning	TBC	Etika rekur bæði matstovu og útvið. Burðardyggur pakningur er neyðugur fyri at arbeiða burðardygt.

Vit eru í løtuni í holt við at gera eitt nýtt spahús á Hotel Føroyum. Hetta verður tikið í brúk í 2023. Verkætlanin fevnir um eini 1000 fermetrar. Fyri at minka um okkara ávirkan á lívfrøðiliga margfeldið hava vit sett 2500 fermetrar av til endurgróðurseting uttan ávirkan frá menniskjum og djórum.

JT ELECTRIC Veitari av elektrotekniskari havútgerð

Okkara luttøka í Burðardyggum Vinnulívi hevur fært til, at vit hava gjørt ætlanir, handlað og økt okkara fokus á at minka um okkara CO_2-útlát og ávirkan á náttúruna. Vit eru byrjað at minka um beinleiðis ávirkanina frá okkara virksemi – til dømis við at minka um útlát frá bygningum og bilum. Vit kunnu tó gera mest mun, tá ið vit stuðla okkara alikundum; eitt nú kunnu vit hjálpa teimum í at betra teirra fóðringarskipanir, so at tey ikki bara spara CO_2, men eisini at minka um teirra fóðurspill, sum ávirkar havumhvørvið. Hetta var eitt stórt fokusøkið hjá okkum í 2021, har vit gjørdu nógv fyri at fáa orkuveitingina til fóðurflakar yvir á ravmagn og at minka um fóðurspill frá alilaksinum.

VEÐURLAGSBROYTINGAR
Í 2021 byrjaðu vit at minka um okkara vav 1-útlát frá brennievnisnýtslu. Vit skiftu dieselbilar út við elbilar. Vit kanna eisini, hvussu vit kunnu fáa okkara vav 1 og 2-útlát frá vakstrarhúsgassum niður á null.

Í 2002 fara vit at fáa okkum hitapumpur í okkara bygningum.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor í minsta lagi niður í 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 5% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	247,405	178,219	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	36,366	38,177	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	60	43	-28%
CO_2e vav 2 útlát	15	15	0%
CO_2e vav 3 útlát*	-	64	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

Vit megna tað, vit máta

Fyri at kunna fylgja við í framstigunum í mun til tey mál, vit settu í fjør, eru vit farin at kanna og innsavna nýggja vitan viðvíkjandi burturbeining av rávørunum, ið vit nýta. Vit ætla at nýta hesa vitan til tess at seta okkum nøkur stutttíðar mál. At byrja við hava vit í 2021 fingið eina nýggja sorteringsskipan til burturkast, so vit kunnu fylgja við í, hvussu nógv verður endurnýtt. Fyri at betra um okkara burturkastsskipan hava vit gjørt avtalu við ein lokalan samstarvsfelaga.

Í samstarvi við henda samstarvsfelaga kunnu vit sundurskilja, sortera og endurnýta kaðalar og metal. Vit nýta eisini IRF at savna saman avlop frá burturkasti til endurnýtslu ella orkuendurvinning.

At betra um okkara burturkastssortering og innsavnan av nýggjum dátum fer vónandi at hjálpa okkum at minka um vav 3 CO_2e-útlátið.

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM
Okkara verandi virkismyndil snýr seg longu um endurnýtslu av gomlum fraktskipum, ið vit byggja um til fóðurflakar til alikundar. Hetta leingir livitíðina á skipunum við einum 30 árum. Meðan fyritøkan veksur og mennist, fara vit eisini at leggja okkum eftir, hvussu vit kunnu byggja og endurbyggja skip við burðardyggum tilfari. Sum liður í, at vit hava bundið okkum til at nýta burðardygt tilfar, mentu vit í 2021 og 2022 eina skrásetingarskipan til endurnýtslu av kopari frá gomlum káplum umframt stál – hóast mongdin av hesum burturkasti er lítil.

Fyri at hjálpa okkara kundum at minka um teirra ávirkan á havið, brúka vit eina nýggja mannagongd fyri at betra um forritini til fóðurskipanirnar við at nýta teldutøkar upplýsingar. Hetta er ein menning, sum vit eru fegin um. Viðkomandi menningarfólk hava fingið frálæru og venjing í hesum fyri at betra um teirra førleikar á hesum øki.

MÁL: JT electric miðjar eftir at gerast net-positiv í okkara lívfrøðiliga margfeldi á landi , og hetta fevnir eitt nú um hvussu vit útvega rávørur. Vit ætla eisini at stuðla havbúnaðarvinnuni við at menna loysnir, sum hjálpir við at røkka eini net-positivari ávirkan á havsins margfeldi.

Ávirkan á nattúruna	Mál	Mát	Útgangsstøði	Frágreiðing
Tilfeingisnýtsla, nýtsla av lendi, dálking og ekoskipanir	Í 2023 verður miðað eftir at luttaka í einum kopar áhugabólki saman við einum av okkara veitarum.	-	-	Tvey av høvuðs ráðevnunum, sum JT electric nýtir í framleiðsluni eru kopar og aluminium, sum bæði hava ávirkan á nattúru skipanina og biodiveristet. Tað ber ikki altíð til at spora hesi evni aftur til teirra uppruna. Tí fara vit at arbeiða saman við okkara veitarum fyri at koma til eitt so burðardygt støði sum møguligt hesum viðvíkjandi í 2030.
	Í 2026 verður miðað eftir, at vit bara keypa frá veitarum, sum hava fáa alt kopar frá góðkendum framleiðslu stødum.	% av kopari verður keypt frá skipaðum kopar framleiðarum	2021 (0)	
	Í 2030 miðjar JT electric eftir at alt kopar til leiðningar kemur frá framleiðslu stødum sum hava bundið seg til NPI (Net-Positive Impact) í biodiversiteti.	% av kopari verður keypt frá NPI námum	2021 (0)	
	Í 2030 miðja vit eftir at stuðla viðkomandi endurnýggjanar verkætlanum.	-	-	
	Í 2030 verður alt aluminium keypt frá góðkendum og burðardyggum veitarum.	% av aluminium við góðkenning	2021 (0)	
Dálking og ekoskipanir	Í 2024 endurnýta 100% av øllum kopari og øðrum metallum frá kaðalum, sum vit avmontera.	100% endurnýtsla	2021 (0)	Fyri at minka um dálking frá teimum vørum vit selja til okkara kundar fara vit at samstarva við veitarar og kundar um at savna inn kaðalar, sum verða niðurtiknir og at endurnýta tilfarið.
	Við JT útgerð skulu vit í 2025 kunna gera mátingar og betringar í fóður faktorum og minka ovurnýtslu av fóðri á 25 alistøðum.	Fóður faktorur	Økis tengar mátingar	Sum stuðul til alarar í arbeiði teirra at røkka málinum um netto-positiva ávirkan á havumhvørvið, fer JT electric at savna upplýsingar og bjóða loysnir fyri at máta og minka ávirkanina, sum alingin hevur á havumhvørvið.
	Í 2026 miðja vit eftir at tað við JT útgerð skal bera til at seta mál og at betra fóðurfaktorin og at minka um fóðurspill.	Nøgd av fóðri yvir eina tíð	Økis tengt	
	Í 2023, nýggjar loysnir til upplýsingar til alarar av umhvørvisárinum frá teirra virksemi.	-	-	

Minka um, endurnýt, nýnýt

Vit arbeiða tætt fyri at menna loysnir til alivinnuna, og hetta inniber at byggja aliringar til laks. Seinastu árini hava vit kannað møguleikar fyri at minka um, endurnýta og nýnýta tað tilfar, sum verður brúkt til aliringar, har tað letur seg gera.

Meðan vit framleiða, eru vit nú farin at savna saman plastið frá aliringunum til endurnýtslu. Vit hava endurvunnið og tikið sundur aliringarnar, tá ið teir ikki eru nóg góðir longur. Fyriuttan at endurnýta summi PE-plastrør til at byggja nýggjar aliringar, senda vit eisini tilfarið til útlondini til nýnýtslu.

Síðani 2019 hava vit á okkara framleiðslu endurnýtt 2.700 tons av PE-plastrør og 5.500 m^3 flamingo til laksabúr. Vit hava eisini sent 1.360 tons av stáli og 362 tons av minni plasti til útlond til nýnýtslu til aðrar vørur.

Hesi tøl mynda okkurt um ein triðjing av tí tilfari, sum varð brúkt til at framleiða aliringar síðstu trý árini. Okkara ætlan er at økja henda part fyri at minka um eftirspurningin eftir natúrrávøru, sum verður brúkt til framleiðslu og tilevning, umframt at minka um møguliga dálking.

KJ HYDRAULIK Veitari av maskinum og tekniskari útgerð

Síðani vit komu við í Burðardygt Vinnulív, hava vit fingið eina púra nýggja fatan av, hvat burðardygd merkir fyri okkum; betri fatan av teimum vansum og møguleikum, ið evni so sum veðurlagsbroytingar og tap av lívfrøðiligum margfeldi hevur at siga fyri okkara fyritøku.

Við fullum stuðli frá leiðsluni eru vit farin at byrja at innarbeiða burðardygd í okkara gerandisdag og framtíðarætlanir – nú í nógv størri mun enn áður. Vit hava veruliga ásannað týdningin av hesum hugsanarhátti, um hetta skal eydnast okkum øllum.

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Í 2021 og í byrjanini av 2022 hugsavnaðu vit okkum um at menna eina haldgóða ætlan, so vit kundu røkka net-positivu málunum, ið vit settu okkum, náttúruni at frama. At minka um um burturkast av plasti, tá ið vit framleiddu aliringar, var fremst í huga. Eisini hevur tað riggað væl at nýnýta PE-plastrør til aliringar. Hetta er nógv at síggja í Føroyum nú og er eisini byrjað í Skotlandi.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Í 2021 fóru vit at meta um okkara ávirkanina av okkara virksemi fyri betur at skilja, hvussu vit í størstan mun kunnu minka um hetta. Vit samskiftu fyrst við veitarar og tóku avgerðir um at forða fyri framtíðar íløgum við okkara CO_2-útláti í huga.

Í 2022 fara vit at fáa okkum grønar hitaloysnir í øllum bygningum og so líðandi at skifta bilarnar út við el-bilar. Fyriuttan at minka um okkara egna útlát síggja vit ein møguleika í at stuðla okkara kundum í at minka um teirra útlát. Eitt nú fara vit í 2022 at halda áfram at bjóða alikundum okkara loysnir við el-riknum arbeiðsbátum.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor í minsta lagi niður í 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 5% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	2,645,759	2,346,376	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	375,347	284,232	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	657	573	-13%
CO_2e vav 2 útlát	152	130	-15%
CO_2e vav 3 útlát*	-	323	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

GOAL: KJ Hydraulik arbeiðir fram ímóti, at gerast net-positiv í okkara ávirkan á hav og landumhvørvið í keypi, framleiðslu og endurnýtslu av rávøru í aliringaframleiðsluni.

Ávirkan á náttuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsok
Tilfeingisnýtsla, landoki, dálking og ekoskipanir	Í 2030 ynskja vit, at 100%av stálinum til framleiðsluna er sertificera burðardygt ella endurnýtsla.	%	2021 (0%)	Ein tann týdningarmesta ráðvøran í framleiðslu er jarn til stálframleiðsluna. Útvinnan av jarni hevur ávirkan á stór arial og harvið eina ávirkan á lívmargfeldið. Stálframleiðsla hevur eisini ávirkan á náttuúruna.
	Í 2030 skal 100% av stáli frá aliringum endurvinnast ella endurnýtast	%	2021 (20%)	
	Í 2030 skal burturkast til burturbeining vera minka við 10%	%	2021	Polyethylenrørini ið nýtt vera til aliringar, hava eitt haldføri til mong ár og kunnu tíð hava ávirkan á náttúruna, um tey ikki vera burturbeind á skynsaman hátt.
Dálking	Í 2030 ynskja vit at bjóða eina tænastu, har KJ móti gjaldi, innsavnar, avmonterar og endurnýtir aliringar, sum verða tiknir úr framleiðsluni.		2021	Ein tann týdningarmesta ráðvøran í framleiðsluni av aliringum er polyethylenrørini. Hesi rør hava eitt haldføri til mong ár og kunnu tíð hava ávirkan á náttúruna, um tey ikki vera burturbeind á skynsaman hátt. Tíð er neyðugt at tryggja, at útgerðin verður rætt endurnýtt ella endurnýtt tá útgerðin hevur tænt sínum endamáli.

Í 2022 fara vit at halda áfram at innføra tiltøk, ið viðgera ávirkanina, ið okkara innkeyp og rávørur til okkara aliútgerð hava, á hav og land. Vit fara eisini at halda eyga við framstigum í mun til ítøkilig mál, sum eru løgd fram í hesi frágreiðing.

Maður er mans gaman

Tað er okkara skylda at vísa á okkara ávirkan á umhvørvið, sum kemur frá mjólkarframleiðsluni. Men fyri at gera ein ítøkiligan mun, so vita vit, at vit mugu samstarva við alla virðisketuna. Tað merkir at fáa bóndurnir at síggja seg sum høvuðsaktør í hesum.

Í 2021 og í 2022 hava vit eftirmett aðalkrøv til bóndurnir, herundir teirra hugburð til umhvørvið. Vit ynskja, at bóndurnir eru við upp á hetta og síggja tað sum eitt felags mál at viðgera ta ávirkan, ið mjólkarframleiðsla hevur á umhvørvið og náttúruskipanir. Vit trúgva, at saman kunnu vit byggja upp eina matvørutrygd her í Føroyum.

MBM Meginfelag búnaðarmanna

Vit meta, at vit hava gjørt nøkur góð framstig, síðani vit komu við. Hetta hevur fyrst og fremst sæst aftur í, hvussu vit ávirka umhvørvið, sum vit hava beinleiðis ávirkan á, og harnæst ta ávirkan, bøndurnir hava. Vit hava sett tiltøk í verk fyri at minka um oljunýtsluna og innført umhvørvisvinarligt pakkitilfar til mjólkarvørurnar. Vit byrjaðu eisini at endurskoða aðalkrøv til bøndurnar, sum framleiða mjólkina. Hetta inniber at miðsavna seg um minka ávirkanina á umhvørvið og at fáa loysnir í lag, sum samsvara við ítøkilig og realistisk mál hjá bóndunum.

At enda hava vit lært eina rúgvu um, hvussu okkara vinna kann verða partur av veðurlagsbroytingunum og tapi av lívfrøðiliga margfeldinum. Vit hava fylgt við í granskingini innan minking av metani frá mjólkarframleiðslu við tí fyri eyga at fáa nýggj háttaløg til Føroya. Hetta er eitt øki, sum vit vita, fer at gera stóran mun.

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Í 2021 settu við sjóneykuna á okkara pakkitilfar, og hvussu vit kunnu minka um ávirkanina á umhvørvið við burðardyggum tilfari. Vit royndu ymiskar loysnir við minni plasti umframt alternativ til plast. Vit hava eina avbjóðing við at finna pakkitilfar, sum bæði er burðardygt og trygt og gott hjá kundunum at nýta.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Fyri at minka um oljunýtsluna skiftu vit í 2021 tveir dieselbilar út við nýggjar elbilar til okkara sølufólk og fingu tvær el-lødistøðir á okkara høvuðsbygningi. Vit byrjaðu hesa tilgongd við at knýta hitan á mjólkarvirkinum upp í fjarhitanetið í Tórshavnar kommunu, sum nýtir spillorku frá brennistøðini og orku frá biogassverkinum hjá Bakkafrosti til at veita hita til bústaðir og fyritøkur.

Í 2022 fingu vit fjarhita í okkara mjólkarvirki, og vit fara at royna at minka um okkara útlát frá orkunýtsluni, tá ið vit framleiða mjólkarvørur (UHT).

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor við í minsta lagi 50% árslok 2030 (við støði í 2020). Vit fara eisini at stuðla bóndunum í at minka um teirra ávirkan á veðurlagsbroytingar.
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 40% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	3,101,168	3,121,068	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	881,461	855,251	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	750	767	2%
CO_2e vav 2 útlát	419	339	-19%
CO_2e vav 3 útlát*	-	249	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

GOAL: Áðrenn 2030 ætla vit at verða net-positiv, tá tað snýr seg um ta ávirkan, sum okkara pakkitilfar hevur á umhvørvið í Føroyum. Vit fara eisini at stuðla bóndunum í at minka um teirra ávirkan á umhvørvið

Ávirkan á náttuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Dálking	Vit vilja skilja okkara burturkast og økja endurnýtslulutfalli til minst 30% av okkara samlaða burturkasti innan ársenda 2023.	% of kg	2020	Við at seta fleiri átøk í verk, minkar okkara umhvørvisárin.
	Vit vilja minka mongdina av plastpakningi við minst 20% av samlað plastpakningi innan árslok 2023.	% of kg	2020	Vit nýta plast sum pakning av okkara vørum. Við at minka lutfallið av plast pakningi, minkar okkara umhvørvisárin.
	Innan árslok 2023 vilja vit hava gjøgnumgingið øll viðurskifti við okkara pakningi og ásett nøktandi mál, so vit náa okkara net-positiva málið í 2030.	-	-	Vit framleiða og selja mjólkavørur til heimamarknaðin. Partar av okkara pakningi kunnu ikki endurvinnast í Føroyum.
	Innan árslok í 2023 vilja vit saman við bøndrunum gera eina ætlan, fyri at minka teirra umhvørvisárin.	-	-	Mjólkarbøndur eru okkara partaeigarar og okkara veitarar av mjólk. Tætta tilknýti ger, at okkara mál eisini umfata teir.

Í 2022 mentu vit eina ætlan um at røkka okkara málum um at gerast net-positiv við okkara pakkitilfari áðrenn 2030, og hesum halda vit áfram við. Vit gera í løtuni íløgur í nýggjar pakkimaskinur, sum fara at fevna um fleiri vørur, og vit fáa eisini eina nýggja burturkastsskipan fyri at betra møguleikarnar innan endurnýtslu og nýnýtslu.

Reingerð

Tað er umráðandi fyri P/F Poul Michelsen-samtakið, at arbeiðið við burðardygd fevnir um alla fyritøkuna. Eitt átak í 2021 var at streymlinja og gera íløgur í nýggjar vørur í PM Pluss, okkara reingerðarfyritøku. Við burðardygd og vælveru sum lyklaorð hava vit gjørt íløgu í nýggj svanamerkt amboð og útgerð til øll okkara starvsfólk og kundar. Hesar vørur eru kendar fyri at hava hægstu umhvørvisgóðskutrygging – eingi skaðilig litevni ella evni – umframt at stuðla undir góðum arbeiðskorum. Vørurnar eru skjalprógvaðar sum verandi burðardyggar úr vøggu í grøv. Starvsfólkini hava fingið undirvísing frá Nordisk Microfiber í ergonomiskari reingerð, virkisføri og rættari dosering – sum minkar um ovurnýtslu av reingerðarevnum. Samstundis samstarva vit við okkara kundar um at minka um talið av plastskrelliposum og betra um sorteringsskipanina. Við hesi íløgu nýtir PM Pluss nú sum heild góðkendar vørar – bæði innan amboð og reingerð – við tí fyri eyga at betra um starvsfólka- og kundanøgdsemi og minka um okkara ávirkan á umhvørvið.

P/F POUL MICHELSEN Heilsøla, reingerðarloysnir og veitsluútleigan

P/F Poul Michelsen fegnast um gongdina í arbeiðnum móti eini burðardyggari framtíð. Framdu broytingarnar hava við sær jaliga ávirkan á mongum økjum – fyrst og fremst á umhvørvið, men eisini á starvsfólk, viðskiftafólk og fyritøkuna sum heild. Í 2021 sóu vit, hvussu samstarvið við hinar limirnar í Burðardyggum Vinnulívi gav okkum meira vitan og íblástur, sum er við til at flyta okkum rætta vegin. Fyrsta árið megnaðu vit at minka okkara vav 1-útlát, og vit mentu góða samstarvið við okkara veitarar, sum er alneyðugt fyri okkara menning innan burðardygd. Vit viðurkenna, at vit júst eru byrjað upp á arbeiðið, og vit halda fram at seta okkum burðardygg mál tvørtur um alla fyritøkuna.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Vit hava í 2021 minkað um okkara vav 1-útlát. Tað eru tvær høvuðsorsakir til hetta: Vit byrjaðu at skifta oljuriknar bilar út við el-bilar, og farleiðir styttust við nýggja Eysturoyartunnlinum.

Komandi árini fara vit framhaldandi at arbeiða við at finna betri loysnir til bilarnar, og eisini er ætlanin at skifta oljufýr út.

Í 2022 fara vit eitt fet víðari og skifta oljufýrar út, vit fáa nýggja køliskipan, ið brúkar minni orku, og leypandi skifta vit bilar út við tí burðardygga í huga, at okkara bilar brúka grønari orkunýtslu. Somuleiðis seta vit í verk eitt nýtt átak til sjaførar, ið snýr seg um hugburðsbroytingina.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 40% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	1,964,055	1,819,108	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	832,396	874,130	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	476	431	-9%
CO_2e vav 2 útlát	336	346	3%
CO_2e vav 3 útlát*	-	177	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

P/F Poul Michelsen hevur sett sær fyri at kanna samansetingina av innfluttum pakkitilfari, sum møguliga kann hava neiliga ávirkan á náttúruna. Vit arbeiða við at fáa vitan um, hvussu vit nágreina, hvørjar vørur eru burðardyggar. Vit hava í hesum sambandi tosað við okkara veitarar og fara at seta mál fyri umlegging til burðardyggar vørur. Umframt at umleggja til burðardyggar vørur, arbeiða vit við at vaksa um partin av útleigu frá veitsla.fo og soleiðis minka um tørvin á einnýtisvørum.

MÁL: P/F Poul Michelsen fer at royna at gerast net-positiv í ávirkanini, sum okkara pakkitilfar hevur á umhvørvið í Føroyum. Vit fara eisini at arbeiða tættari saman við veitarum og viðskiftafólkum og kanna, hvørja ávirkan vit hava á náttúruna.

Ávirkan á náttuskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Dálking	Fram til 2024 fara vit at kortleggja vørubólkar við pakkitilfari, tosa við viðkomandi áhugapartar og seta okkum mál fyri at gerast burðardygg á økinum.	-	-	Sum heilsøla hava vit ávirkan á, hvørjar vørur verða innfluttar til Føroyar. Vit vilja tí saman við veitarum, kundum og tænastuveitarum annars, virka fyri at minka um neiliga ávirkan av burturkasti í føroyskum umhvørvi.
	Samstundis sumvørubólkarnir við pakkitilfari verða kortlagdir, fremja vit alsamt fleiri broytingar til meira burðardyggar vørur	% av einnýtis-vørum úr plasti	2021	
	Vit økja um útleigu av sambærligum vørum á veitsla.fo og minka sostatt um tørvin á einnýtisvørum í Føroyum	Mest útleigaðu vørur	2022	

Í 2022 halda vit áfram at røkka hesum málum.

At standa á odda fyri grøna orkuskiftinum

Umframt at minka um egin útlát av vakstrarhúsgassum, nýta vit okkara servitan innan orkuskipanir og verkætlanarleiðslu til at hjálpa okkara kundum við at minka um teirra útlát. Í 2021 arbeiddu vit við sjóhitaskipanum til fleiri av okkara kundum, og vit vístu hervið kundunum á loysnir, ið kunnu minka teirra CO_2-útlát niður í helvt longu fyrsta árið eftir, at skipanin verður tikin í nýtslu. At nýta orkuskipanir, ið eru tengdar at eli, er ein liður í at avkola Føroyar, nú øll el-framleiðsla skal stava frá varandi orkukeldum í 2030.

Fyri at røkka okkara máli um at innføra burðardyggar loysnir í viðkomandi verkætlanir, er umráðandi at øll okkara starvsfólk hava vitan og førleikar innan økið. Í fjør arbeiddu vit við at fáa burðardygga hugsan inn sum ein natúrligan part av okkara fyritøku og okkara verkætlanum. Hetta gjørdu vit við at hava framløgur og kjak um ymisk arbeiðsøki og at viðgera, hvussu vit á bestan hátt kunnu leiða arbeiðið á økinum ímóti at gerast meira burðardygt.

At hjálpa okkara kundum við optimering av orkuskipanum, hevur altíð verið ein stórur partur av okkara ráðgeving. Endamálið við orkuoptimering hevur ígjøgnum árini oftast verið ein fíggjarlig sparing, men nú vit í størri og størri mun gerast ein partur av orkuskiftinum til varandi orkukeldur, ynskja vit at taka atlit til ta umhvørvisligu ávirkanina í okkara ráðgeving eisini.

SMJ Ráðgevandi verkfrøðingar

Sum ein av stóru ráðgevarafyritøkunum í Føroyum viðurkennir SMJ sína ábyrgd í grøna orkuskiftinum. Vit hava tí bundið okkum til eitt nullútlát av vakstrarhúsgassum og at gerast net-positiv í mun til lívfrøðiliga margfeldið áðrenn 2030.

Hóast vit sum ráðgevar vita, at vit gera størst møguligan mun við at hjálpa okkara kundum at skerja teirra útlát, hava vit sett okkum fyri at røkka okkara málum innanhýsis fyrst. Vit hava tí gjørt nakrar broytingar á kontórinum tey seinastu árini. Vit hava millum annað gjørt íløgur í el-bilar og jarðhitaskipanir, sum longu hava minkað um okkara vav 1-útlát í 2021. Vit vænta at síggja eina enn størri minking í 2022, tá ið allar skipanirnar eru tiknar í brúk.

Okkara týdningarmiklasta mál er at stuðla okkara kundum og samstarvsfeløgum í at minka um teirra ávirkan á umhvørvið í øllum viðkomandi verkætlanum. Vit fegnast um at síggja ein øktan áhuga í grøna orkuskiftinum á bæði tí privata og kommunala økinum. Vit hava í 2021 stuðlað nógvum kundum í at leggja um til grøna orku.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Í 2021 skiftu vit fýra bensinbilar út við elbilar, sum førdi til eina minking av okkara vav 1-útláti. Vav 1- og 2-útlátið frá bilunum minkaði við áleið 20% frá 2020 til 2021. Umframt at minka um egið útlát hava vit í 2021 stuðlað nógvum kundum í at velja burðardyggar orku-skipanir.

Í byrjanini av 2022 tóku vit eina jarðhitaskipan í nýtslu. Henda skipan fer at minka okkara vav 1-útlát munandi. Í 2022 fara vit at halda áfram at menna leiðreglur til tess at kunna gera byggivinnuna meira burðardygga.

MÁL VAV 1 & 2: Vit binda okkum til eitt nullútlát í vav 1 og 2 CO_2 spor innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 35% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	382,567	282,053	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	53,474	63,877	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	74	70	-5%
CO_2e vav 2 útlát	22	25	15%
CO_2e vav 3 útlát*	-	43	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Vit hava í mong ár hjálpt kundum okkara at gera umhvørvisárinsmetingar fyri at tryggja, at nýggjar verkætlanir ikki fara fram í virðismiklum ella viðkvomum náttúruøkjum, sum áttu at verið varðveitt. Vit fara framyvir at eggja øllum okkara kundum at fremja umhvørvisárinsmetingar í viðkomandi verkætlanum og á henda hátt sleppa undan ella minka um óneyðuga ávirkan á náttúruna.

GOAL: SMJ fer at arbeiða ímóti at hava net-positivar loysnir við í øllum viðkomandi verkætlanar-tilboðum í 2030. Eisini arbeiða vit við loysnum, ið verja og varðveita høvini og lívfrøðiliga margfeldið, í øllum viðkomandi verkætlanum í 2030.

Ávirkan á náttúruskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Ávirkan á jørð og lendi	Vit stuðla kundum í at gera árinsmetingar av økjum og lendi.	% av verkætlanum, ið gera eina árinsmeting	2021	Ávirkan av eini byggiverkætlan á jørð og lendi.
Dálking	Vit stuðla kundum í at endurnýta byggitilfar umframt at velja byggitilfar, ið hevur umhvørvisliga góðkenning.	% av kundum, ið raðfesta burðardygd í teirra byggiverkætlanum	2021	Ávirkan av byggitilfari í byggiverkætlanum.
Dálking - rusk	Vit stuðla kundum í at minka um burturkast frá byggiverkætlanum, við at gera so nágreiniligar nøgdarlistar sum møguligt.	Nágreinaðir nøgdarlistar, ið lýsa nøgdina av øllum tilfari til eina verkætlan.		Ein nágreinaður nøgdarlisti til eina byggiverkætlan, kann minka munandi um avlopið av byggitilfari til verkætlanina.
Dálking - rusk	Vit minka um burturkasti frá egnum virksemi, og stuðla kundum í at handfara og skilja burturkast.	Minka um nøgdina av ruski og betra um skiljing og handfaring av ruski.	-	Møguleiki fyri at betra um skiljing og handfaring av burturkasti í Føroyum. M.a. minka nøgdina av ruski og økja um endurnýtslu.
Dálking - spillivatn	Vit stuðla kundum í at finna loysnir til útleiðing og reinsing av spillivantni.	Móttøkuøkir geva ikki ábending um trupulleikar av dálking.		Útleiðing av óreinsaðum spillivatnið kann hava neiliga ávirkan á eitt móttøkuøki.

Í 2022 fara vit at fáa eina betri burturkastsskipan. Vit fara eisini at stuðla okkara kundum í teirra metingum um, hvørja ávirkan tey hava á umhvørvið; skipan av burturkasti, vatni og spillvatni; og at ráðgeva um burðardyggar byggiloysnir.

Eitt hav av broytingum

Í 2021 lovaðu vit alment at gerast net-positiv í okkara ávirkan á havumhvørvið, tá ið vit burturbeina útgerð fyri fiski- og alivinnuna. Hetta var eitt týdningarmikið ár fyri okkum. Hetta var árið, har vit byrjaðu eitt tætt samstarv við IRF og fingu eitt grundarlag, sum skal til, nú vit fara at endurvinna fiski- og aliútgerðina.

Síðani vit byrjaðu hetta samstarv, hava vit longu endurvunnið fleiri tons av tilfari.

Vit hava bundið okkum til at røkka okkara málum saman við okkara kundum umframt at leita eftir nýggjum møguleikum fyri at styrkja og byggja upp felagsskapir, sum kunnu hjálpa okkum á mál.

VÓNIN Fiskiskapur, fiskaaling og frálandsveiting

Síðan átakið byrjaði, hava vit bygt upp og styrkt okkara sambond fyri at røkka okkara málum viðvíkjandi veðurlagi og lívfrøðiligum margfeldi.

Í 2021 fingu vit eitt beinleiðis samstarv við IRF. Vit øktu um mongdina av brúktum fiskireiðskapi, ið vit fingu frá kundum okkara, til at sundurskilja og sortera, áðrenn vit endurvinna tað. Sum ein týðandi framleiðari av útgerð til fiski- og alivinnuna eru vit vís í, at okkara tætta samstarv við kundar og lokalar tænastuveitarar fer at hava eina góða ávirkan á havumhvørvið.

Sum árið hevur liðið, meta vit, at hesar avbjóðingar hava ment fyritøkuna og starvsfólkini mótvegis einum meira burðardyggum hugsanarhátti, sum bæði hevur eina ávirkan á okkara gerandisdag og eisini virksemið í fyritøkuni.

VEÐURLAGSBROYTINGAR

Vit hava kannað hóskandi loysnir til at minka um CO_2e-útlát frá gassolju. Fyri at loysa avbjóðingarnar við veðurlagsbroytingunum eru vit farin at umhugsa ymiskar loysnir til tess at minka um CO_2e-útláti frá okkara virksemi umframt at røkka teimum málum, vit settu í fjør. Á okkara trimum støðum í Føroyum er CO_2e frá gassolju høvuðsorsøkin til útlát, so tí hava vit tikið mest atlit til hetta. Í 2021 hava vit kannað hóskandi loysnir til at nýta varandi orkukeldur heldur enn olju.

MÁL VAV 1 & 2: Vit fara at minka vav 1 og 2 CO_2 spor við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2020).
MÁL VAV 3: Vit fara at minka vav 3 CO_2 spor (frá mark niðanfyri) við í minsta lagi 50% innan árslok 2030 (við støði í 2021).

	2020	2021	Broyting ár um ár
Orkunýtsla í Føroyum	**[kWh]**	**[kWh]**	**%**
Beinleiðis orkunýtsla vav 1	2,801,185	2,756,404	-
Óbeinleiðis orka (el) nýtsla vav 2	405,645	443,655	-
CO_2e Útlát í Føroyum	**[TCO_2e]**	**[TCO_2e]**	
CO_2e vav 1 útlát	704	693	-2%
CO_2e vav 2 útlát	164	176	7%
CO_2e vav 3 útlát*	-	228	-

*(Fráboðanarmarkvirði: starvsfólkaferðing, handilsferðir, burturkast frá virksemi, og olja- og orka atknýtt virksemi)

Í løtuni byggja vit ein 930m² bygning við Norðskála til impregnering, coating og turking av aliringum til alivinnuna. Hetta verður rikið við varandi orkukeldum, ið koma í staðin fyri gassolju, sum í verandi løtu verður nýtt. Vit eru vís í, at hetta fer at føra við sær eina minking í okkara vav 1-útlátum næsta ár.

LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI OG HEILSUSTØÐAN Í HAVINUM

Ein tann besta ávirkanin, vit kunnu hava á umhvørvið, er at stuðla kundunum í at burturbeina útgerðina á ábyrgdarfullan hátt. Í 2021 broyttu vit mannagongd hesum viðvíkjandi fyri at tryggja, at útgerðin verður endurvunnin.

GOAL: Vónin fer at royna at gerast net-positiv áðrenn 2030 í okkara ávirkan á havumhvørvið í sambandi við burturbeining av fiskiútgerð.

Ávirkan á náttúruskipan	Mál	Mát	Byrjunarár	Orsøk
Dálking	Í 2025, fara vit at hava endurvunnið fleiri trol enn vit seldu í 2020.	% av m³ fyri trol	2020	Vónin hevur eina ábyrgd sum stórveitari til føroysku fiski- og alivinnuna at hjálpa kundum við burturkasti av fiskireiðskapi fyri at minka um dálking í havinum. Okkara mál er at leingja um livitíðina á okkara nótum og trolum. Vónin setur sær nýggj mál á hesum øki í 2025.
	Í 2025, fara vit at hava endurvunnið fleiri alinótir enn vit seldu í 2020.	% av m³ fyri alinótir	2020	
Sløg	Vit vilja arbeiða fyri at bøta um umstøðurnar hjá ymisku djórasløgum, sum verða ávirkað av stórum plasti í havinum.	-	-	Vónin ynskir at taka lut í verkætlanum, sum hava til endamáls at bøta um umhvørvið í havinum.
	Vit, sum serkunnleiki innan menning og framleiðslu av fiskireiðskapi, vilja deila týðandi vitan við áhugapartar.	-	-	

Í 2022 fara vit at senda brúktar alinótir frá okkara alikundum úr Føroyum til Litava, har tær verða endurvunnar. Vit vænta eisini at gera eina avtalu við IRF og eina hollendska endurvinningsfyritøku um endurvinning av gummi.

Burðardygt Vinnulív er farið at samstarva við løggilda grannskoðanarvirkið Januar fyri at fáa eina avmarkaða grannskoðan av dátum um útlát. Tey eru serfrøðingar og fara at ráðgeva okkum í at rapportera gongdina.

Rapporteringsgrundarlag fyri GHG-útlát

Vav 1 og 2 útlát

- Øll útlát og allir umrokningarfaktorar fyri beinleiðis útlát (vav 1) koma frá dátum hjá DEFRA (Ongland) frá 2021, meðan útlátsfaktorar fyri el -nýtslu eru grundaðir á nýggjastu tølini, ið vit hava fingið frá SEV.
- TC0^{2}e (Tonnes of Carbon Dioxide equivalent) verða útroknað og borin fram her. Hetta fevnir um vandar fyri globala upphiting, sum stendur frá vakstrarhúsgassi, sum hevur samband við brenning av lívrunnum brennievnum umframt koltvísúrni (CO_2).
- El -nýtsla (vav 2) elvir til óbeinleiðis útlát umvegis brenning av lívrunnum brennievnum í orkustøðum til tess at framleiða orku. Beinleiðis útlát (vav 1) kemur frá brenning av lívrunnum brennievnum – føstum, flótandi og gassi – til upphiting, sum eitt nú skapar framdrátt í akførum og flutningstólum.
- Háttalagið, vit rokna kolevni við, er út frá The Greenhouse Gas Protocol, a Corporate Accounting and Reporting Standard (endurskoðað útgáva).
- Framferðarhátturin, ið varð valdur, var eftirlit við virkseminum. Øll tøl fyri útlát eru beinleiðis nýtsla fyri hvørja fyritøku faldað við einum orku -umrokningarfaktori (har tað er hóskandi) og kolevnisútlátfaktori fyri hvørja nýtslueind.
- Vit hava ikki tikið hædd fyri vantandi ella óliðug tøl frá virkseminum hjá fyritøkunum.
- Sami útláts faktorur fyri fjarhita sum Bakkafrost hevur nýtt í teirra 2021 Burðardygds frágreiðing og GHG fráboðanini, er nýtt sum grundarlag í hesi frágreiðing. Vónin verður, at ein kolvetnisútlátsfaktorur verður útroknaður av fjarhitafelagnum, og tøkur fyri framtíðar frágreiðingar.
- Tvær smærri rættingar eru gjørdar í tølunum fyri undanfarna ár. Rættingin er gjørd viðvíkjandi útláts faktorinum, sum hevur verið nýttur til at útrokna útláti frá Diesel olju (til nýtslu av "biofuel mix") í vavi 1, og ein rætting til útlátsfaktorin fyri blýfrítt bensin. Hetta hevur viðført smærri tillagingar í fráboðaðu tølunum fyri vav 1 í 2020.
- Rættingar eru gjørdar í sambandi útrokningar av vav 1 hjá Effo, KJ Hydraulik og P/F Poul Michelsen fyri 2020, og í sambandi við vav 2 útrokningar hjá P/F Poul Michelsen, hetta er gjørt tí nýggj vitan hevur verið atkomilig.

Vav 3 útlát

Fráboðanar- markvirði: Bakkafrost

- Í 2019 settu vit tøl á okkara óbeinleiðis vav 3 útlát fyri fyrstu ferð. Vit endurskoðaðu teir 15 vav 3 bólkarnar av GHG protokollini og eyðmerktu 9, sum vóru av týdningi fyri Bakkafrost og har gott grundarlag var tøkt at meta um útlátið í hesum sambandi. Við at samanbera okkara carbonupplýsingar við upplýsingar í vinnuni fyri hvønn bólk. Hetta umfataði útflutning av vørum, keyptar vørur og tænastur, nýtslu av seldum vørum (frystar og tilgjørdar) endaviðgerð av seldum vørum, innflutningur og útbering, starvsfólkaferðing, handilsferðir, olja- og orka atknýtt virksemi og burturkast í virksemi. Meðan vit gera eina roynd at greiða frá hesum tali fyri árið, eru vit greið yvir, at í framtíðini kunnu fleiri bólkar verða við undir vav 3 útrokningini.

Fráboðanar- markvirði: Øll onnur feløg

- Fyrsta stig, var at øll luttakandi feløg (undantikið Bakkafrost) gjøgnumgingu fýra av teimum 15 flokkunum í vavi 3 frá GHG protokollini, har gott prótvilfar er tøkt til at meta um avleidda útláti. Hesi eru útlát í sambandi við: Pendling til og frá arbeiðsplássi, handilsferðir, burturkast frá virkseminum & olju og orku tengt virksemi. Við nýtslu av vinnuligum kolvetnis grundtølum (benchmark) hava vit mett um útláti knýtt at hvørjum eyðmerktum flokki.
- Mál til minking av útláti vóru sett, ið eru knýtt at tveimum av hesum eyðmerktu flokkunum, har útgangsstøði er tikið út frá málsetningunum fyri útláts- minking í vavi 1 og 2. Metingar eru gjørdar, viðvíkjandi vektini av burturkastið ið stavar frá virkseminum.

ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA VIÐ AVMARKARI VISSU VIÐVÍKJANDI FRÁGREIÐING HJÁ BURÐARDYGGUM VINNULÍVI UM GHG-ÚTLÁT

Tórshavn, tann 7. september 2022

Til áhugabólkarnar hjá Burðardyggum vinnulívi

Vit hava gjørt eina váttan við avmarkaðari vissu um hjálagdu GHG-frágreiðingina hjá Burðardyggum Vinnulívi fyri árið, sum endaði 31. desember 2021. Váttanin viðvíkir útláti fyri vav 1 og vav 2.

Ábyrgdin hjá Burðardyggum Vinnulívi av GHG-frágreiðingini

Burðardygt vinnulív hevur ábyrgdina av at gera eina GHG-frágreiðing í samsvari við ásetingarnar í "Greenhouse Gas Protocol" sum frágreitt í "Rapporteringsgrundarlag fyri GHG-útlát" í GHG-frágreiðingini. Ábyrgdin umfatar uppsetan, implementering og viðlíkahald av innnanhýsis eftirliti, sum verður mett skal til, soleiðis at GHG- frágreiðingin ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

GHG kvantifisering viðførir týðandi íbornar óvissur grundað á, at ófullfíggjað vísindalig vitan verður nýtt til at fastseta útlátsfaktorar og virðini, ið eru neyðug til at samanbinda útlát av ymiskum gassum.

Okkara óheftni og góðskueftirlit

Vit hava hildið ásetingarnar um óheftni og onnur etisk krøv í etisku reglunum fyri góðkendar grannskoðarar, ið fevnir um óheftni og onnur krøv, sum byggja á grundleggjandi meginreglurnar um falsloysi, partsloysi, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, trúnað og yrkisatburð.

Grannskoðanarvirkið Januar er bundið at halda altjóða standardin um góðskustýring, ISQC 1, og brúkar soleiðis eina umfatandi góðskustýringsskipan, herundir skjalprógvaðar politikkir og mannagongdir viðvíkjandi tí at halda etisk krøv, yrkisstandardir og galdandi ásetingar í lóg og øðrum reglum.

Okkara ábyrgd

Okkara ábyrgd er at gera eina niðurstøðu við avmarkaðari vissu um GHG-frágreiðingina grundað á arbeiði, ið vit hava gjørt og tey prógvini, ið vit hava fingið. Okkara váttan við avmarkaðari vissu er gjørd í samsvari við altjóða standardin um váttanaruppgávur um Greenhouse Gas Statements ("ISAE 3410"), útgivin av International Auditing and Assurance Standards Board. Standardurin krevur, at vit leggja arbeiði til rættis, soleiðis at vit fáa avmarkaða vissu fyri, at GHG-frágreiðingin ikki hevur týðandi skeivleikar.

Ein váttan gjørd við avmarkaðari vissu í samsvar við ISAE 3410 inniber, at vit meta um, hvørt standardurin er hóskandi til umstøðurnar hjá Burðardyggum vinnulívi og nýtsluna av Greenhouse Gas Protocol sum grundarlag fyri frágreiðingini, meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í GHG-frágreiðingini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, reagera uppá metta váðan um neyðugt í umstøðunum, og meta um samlaðu framløguna av GHG-frágreiðingini. Arbeiði í sambandi við eina váttan við avmarkaðari er munandi minni umfatandi, enn tá ein váttan verður gjørd við grundaðari vissu bæði viðvíkjandi mannagongdunum í sambandi við metingar av váðum, íroknað fatan av innanhýsis eftirlitinum, og mannagongdunum, sum eru gjørdar sum reaktión uppá mettu váðarnar.

Okkara arbeiði var bygt á okkara yrkisligu metingar, og fevndi um fyrispurningar, eygleiðingar av mannagongdum, gjøgnumgongd av skjølum, greinandi arbeiði og meting hvørt kvantifiseringsháttalagið og frágreiðingin, samsvara við framda arbeiði.

Samsvarandi umstøðunum av arbeiðinum, so hevur arbeiði hjá okkum umfatað:

- Gjøgnum fyrispurningar fingið eitt forstáilsi av eftirlitsumhvørvinum og vitanarskipanunum hjá feløgunum í Burðardygt Vinnulívi, ið eru viðkomandi til máting av útláti og frágreiðing, men vit hava ikki mett um sniðgeving av serstøkum mannagongdum, innheinta prógv fyri teirra implementering, ella kanna um hesi eru effektiv.
- Vit hava mett um hvørt mannagongdirnar hjá Burðadyggum Vinnulívi fyri metingum eru hóskandi og eru brúktar konsekvent. Tó hava vit ikki kanna undirliggjandi data, ið metingarnar eru bygdar á, ella gjørt okkara egnu útrokningar til at meta um metingarnar hjá Burðardyggum Vinnulívi.

Vavið av arbeiðinum í sambandi við eina váttan við avmarkaðari vissu er munandi minni enn, tá ein váttan við grundaðari vissu verður givin. Tískil er vissan í okkara niðurstøðu munandi minni enn tann vissa, sum verður givin, um talan var um eina váttan við grundaðari vissu. Samsvarandi hesum, so lata vit ikki eina niðurstøðu við grundaðari vissu um, hvørt frágreiðingin hjá Burðardyggum Vinnulívi um GHG-útlát í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við "The Greenhouse Gas Protocol", sum frágreitt í "Rapporteringsgrundarlag fyri GHG-útlát" í GHG-frágreiðingini.

Niðurstøða

Undir gjøgnumgongdini eru vit ikki komin fram á viðurskifti, ið geva okkum grund til at halda, at frágreiðingin frá Burðardyggum Vinnulívi um GHG-útlátið fyri árið, sum endaði 31. desember 2021, ikki í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við "The Greenhouse Gas Protocol", sum frágreitt í "Rapporteringsgrundarlag fyri GHG-útlát" í GHG-frágreiðingini.

Avmarking viðvíkjandi vav 3 útláti í frágreiðingini

Niðurstøða okkara fevnir ikki um upplýsingarnar viðvíkjandi vavi 3, sum eru við í frágreiðingini, og vit geva tískil ikki nakra váttan við vissu um hesar. Í sambandi við okkara gjøgnumgongd av útlátunum fyri vav 1 og 2 hava vit lisið upplýsingarnar um vav 3 í frágreiðingini hjá Burðardyggum Vinnulívi. Í hesum sambandi bleiv mett um, hvørt upplýsingarnar viðvíkjandi vavi 3 eru í ósamsvari við, ella um týðandi feilir eru í mun til teir upplýsingar, sum eru móttiknir í sambandi við okkara gjøgnumgongd av vavi 1 og 2. Vit hava ikki viðmerkingar í hesum sambandi.

P/F Januar
Løggilt grannskoðaravirki

Óli Joensen
statsaut. revisor

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

BURÐARDYGT
VINNULÍV 2021